# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Teir eru oddalið í føroysku kappingini, og vit kunnu vænta okkum ein torføran dyst*

*Richard Dunne, liðformaður hjá Manchester City*

# Lítil áhugi fyri EB/Streymi

**Áhugin fyri EB/Streymi var lítil á tíðindafundinum, sum var í FSF-húsinum í gjár. Ensku miðlarnir spurdu mest um Ronaldinho, sum í gjár skifti til AC Milan**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*
*Myndir: Sofus D. Johannesen*

Nógv hevur verið skrivað og tosað í ensku miðlunum seinastu tíðina um eitt møguligt skifti hjá Ronaldinho til Manchester City. Á tíðindafundinum í FSF-húsinum var tað eisini brasilisku stjørnuna, sum í gjár skrivaði sáttmála við AC Milan, prátið snúði seg um. Áhugin var lítil fyri dystinum ímóti EB/Streymi, og fingu Mark Hughes og Richard Dunne, venjari og liðformaður, ikki høvið at tosa um føroyska liðið, áðrenn føroysk blaðfólk varpaði ljós á dystin á Tórsvølli í kvøld.

Sigfríður Clementsen og Levi Hanssen, sum umboðaðu EB/Streym, fingu ongan spurning, og sluppu ikki til orðanna ta løtuna, tíðindafundurin var.




*Levi Hanssen og Sigfríður Clementsen, sum umboðaðu EB/Streym, fingu ongan spurning, meðan Mark Hughes og Richard Dunne einamest vórðu spurdir um Ronaldinho*

## Hava alt at vinna

Mark Hughes setti seg fyrr í summar í venjarasessin hjá Manchester City. Hann staðfesti, at fyrireikingarnar hava gingið væl, og at hann somuleiðis sær bjart upp á komandi kappingarár.

Um dystin í kvøld gjørdi hann greitt, at EB/Streymur hevur alt at vinna.

- Hetta er mín fyrsti dystur in av týdningi sum venjari í Manchester City. Í farna kappingarári spældu vit eisini Intertoto Cup við Blackburn, og tað var frálík fyrireiking. Trupulleiki hjá okkum er kanska, at vit hava alt at tapa. EB/Streymur, hinvegin, hevur alt at vinna, og tað kann verða ein fyrimunur hjá teimum, segði Mark Hughes á tíðindafundinum. Hann legði aftrat, at onglendingarnir eru fullmannaðir á ferðini til Føroya.

## Lisið um EB/Streym

Richard Dunne, liðformaður hjá Manchester City, segði seg ikki hava stórvegis kunnleika til mótstøðuliðið á Tórsvølli í kvøld. Hann hevur lisið eitt sindur um EB/Streym, men tað var fyri so vítt tað heila.

- Teir eru oddalið í føroysku kappingini, og vit kunnu vænta okkum ein torføran dyst. Sum liður í fyrireikingunum fara vit at hyggja at sjónbandaupptøku av teimum undan dystinum, og vónandi verða vit klókari. Tað er sjálvandi eitt ómetaliga stórt vónbrot, um vit ikki vinna okkum víðari. Vit skulu verða glaðir fyri møguleikan at luttaka í UEFA CUP, og hetta er frálík upptakt til Premier League, segði Richard Dunne, sum sipaði til, at Manchester City vann sær pláss í kappingini vegna fair-play.



*Benjani telist millum heilt stóru stjørnur í Manchester City, og honum skulu teir í EB/Streymi halda eitt vakið eyga við í kvøld*



*Manchester City hevur allar mans við í hópinum við á Føroya ferðini. Einasta undantakið er italiumaðurin Bernado Corradi, sum fekk ein skaða undir venjingarlegu í Týsklandi herfyri*